

# Blaðstjórin á »Israels Røst« vitjar

**Vinafelagið Føroyar - Ísrael fær nú áhugaverda vitjan út Ísrael. Tað er leiðarin í Skandinavisku Sjómanskirkjuni í Haifa, Gro Wenske, sum kemur til Føroya at greiða frá um støðuna í landinum beint nú**

VITJAN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Gro Wenske er norsk og hevur búð í Ísrael í skjótt 45 ár. Hon er prestlærd og hevur altíð havt stóran kærleika fyri Ísrael og fólkinum har. Hon ferðast javnan í ymiskum londum at hava fyrilestrar um støðuna í Ísrael og í Miðeystri sum heild.

Gro Wenske er blaðstjóri á „Israels Røst" hvørs endamál er at greiða frá andaliga bardaganum sum er í Ísrael. Tað er serliga jødarnir sum búgva í Samaria sum líða nógv og hava tað trupult. Gro kemur hesaferð eisini at greiða frá um fornfrøðina, sum nú hevur prógvað at jødarnir vóru í Egytalandi. „Nútíðar" fornfrøðin hevur altíð tvíhildið um, at alt áðrenn Dávid kong var bara søgn. Gro fer eisini at greiða frá um kríggið í Gaza og tað sum at enda fekk Ísrael at brúka vápnamegi.

Gro Wenske fer at hava hesar fyrilestrar í Missiónshúsinum á Glyvrum hóskvøldið 27. august klokkan 20. Í missiónshúsinum Libanon í Sørvági fríggjakvøldið 28. august klokkan 20. Leygardagin 29. august klokkan 11 verður skeið fyri ungdómsleiðarar í Vága kunningarstovu í Miðvági. Leygarkvøldið 29. august klokkan 20 verður fyrilestur í Klaksvík. Sunnudagin 30. august í Filadelfia á Landavegnum í Tórshavn klokkan 11 og sunnukvøldið klokkan 20 verður fundur í Skúlanum á Trøðni, Frælsið 32, í Havn. Mánakvøldið 31. august klokkan 19 í Samljóð í Skopun. Týskvøldið 1. september verður mansmøti í Bø og mikukvøldið 2. september klokkan 20.00 verður fyrilestur í Filadelfia í Gøtu.

# Uttanríkisráðharrin á tænastuferð í Evropu

**Uttanríkisráðharri Jørgen Niclasen er í dag farin á tænastuferð til fýra evropiskar smátjóðir, sum eru Liktinstein, Andorra, San Marino og Luksemborg. Liktinstein er limur í EFTA, Luksemborg er limur í ES, og Andorra og San Marino eru í hvørgum felagsskapi**

POLITIKKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Endamálið við vitjanini er sínámillum ráðførsla um avbjóðingarnar hjá smátjóðum í Evropu. Harumframt luttekur ráðharrin eisini í marknaðarføringini av Føroyum í Wien og Graz tann 4. og 5. september í sambandi við, at Føroyar spæla landsdyst móti Eysturríki.

Á ferðini fer Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, á fund við uttanríkisráðharran hjá Liktinstein, Aurelia Frick, og starvsbróður sín í Andorra, Xavier Espot. Eisini hittir hann uttanríkisráðharran hjá San Marino, Federica Bigi, eins og hann eisini fer á fund við Jean Asselborn, ið er uttanríkisráðharrin hjá Luksemborg.



*Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri*

Á fundunum sínámillum fara starvsbrøðurnir at viðgera evropapolitkk og mongu avbjóðingarnar, sum evropisku smátjóðirnar hava í felag.

Fyrsti fundurin verður við uttanríkisráðharran hjá Liktinstein, og her er Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri eisini boðin at hitta forsætisráðharran Klaus Tschütscher.

# Stórt kampingtreff á Svangaskarði

**Vikuskiftið 11. - 13 september verður skipað fyri stórum kampingtreffi á grasvøllinum á Svangaskarði. Ætlanin er at hetta skal vera Føroya størsta kampingtreff, og verður hetta helst eisini seinasta treff í ár. Á grasvøllinum er sera gott pláss, so helst verður pláss fyri øllum kampingvognum og bilum í Føroyum**

KAMPING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Á Svangaskarði eru hentleikarnir av teimum allarbestu, siga fyrireikararnir. El verður lagt á økið, vatn er eisini lagt til, umframt at umstøður eru til at tøma rottangan. Skipað verður fyri felags hugnakvøldið í B68 húsinum antin fríggjakvøldið ella leygarkvøldið.

Frá klokkan 19 hóskvøldið ber til at koma á økið við vogninum og bilinum. Seinasta freist at koyra av aftur økinum er mánadagin.

Kostnaðurin fyri limir í Camping.fo er 130 krónur náttina fyri hvønn kampingvogn/bil. Tá er alt íroknað. Øll eru vælkomin, og kostnaðurin fyri tey, sum ikki eru limir í Camping.f o er 200 krónur náttina fyri hvønn kampingvogn/bil. Fólk í tjaldi gjalda hálvan prís.

